**Tíðindaskriv 22. august 2013**

Eik Banki P/F
Yviri við Strond 2
Postboks 34
FO-110 Tórshavn

Tel.: 348000
Fax.: 348800

office@eik.fo
www.eik.fo

Swift: EIKB FO TF
Pf. skr. nr.: 5534

# Eik Banki góðar 44 mió. kr. í avlopi eftir skatt fyrra hálvár

**Hálvársroknskapurin hjá Eik Banka vísir eitt avlop upp á 44,6 mió. kr. eftir skatt. Fyri skatt er úrslitið 54,4 mió. kr. Við hálvárið 2013 javnvigar fíggjarstøðan við 7,0 mia. kr., og eginpeningur bankans er 1,2 mia. kr.**

"Fyrra hálvár hjá Eik Banka hevur hilnast væl, og Eik roknar við einum avlopi á áleið 60-90 mió. kr. fyri skatt fyri árið 2013", sigur Súni Schwartz Jacobsen, forstjóri í Eik Banka.

Í stuttum kann nevnast, at:

- Úrslitið farna tíðarskeið vísir eitt avlop á 44,6 mió. kr.
- Úrslitið áðrenn skatt er 54,4 mió. kr.
- Útlán bankans eru 4,7 mia. kr.
- Innlán bankans eru 5,5 mia. kr.
- Niðurskrivingar av útlánum og yvirtiknum ognum eru á 6,7 mió. kr., íroknað 14,3 mió. kr. í virðisjavnan
- Yvirdekningur í mun til lógarkravda gjaldførið á 222,8%
- Solvensurin við hálvárið er 23,3%, móti einum tørvi á 11,2%

Útlánini eru 4,7 mia. kr., sum er eitt vet lægri enn við ársenda 2012. Innlán bankans økjast framhaldandi og eru tann 30. juni 2013 á leið 10 mió. kr. hægri enn við árslok 2012, um hædd verður tikin fyri láninum við statsveðhaldi á umleið 1 mia. kr., sum bankin rindaði aftur í februar 2013.

Av javnanum tann 30. juni 2013 á 7,0 mia. kr. er eginognin áljóðandi 1,2 mia. kr. og innlán áljóðandi 5,5 mia. kr. Bankin fíggjar soleiðis útlán við eginpeningi og innlánum í samsvari við yvirskipaða málsetningin hjá bankanum.

Solvensurin er 23,3% og likviditeturin áleið fýra ferðir lógarkravda minstamarkið. Sostatt eru bæði solvensur og likviditetur hjá bankanum góðir.

**Góða og skjóta tænastu til allar okkara kundar til kappingarførar prísir**
Eik hevur lækkað bústaðarrentuna í tveimum umførum fyrra hálvár 2013. Fyrru ferð 15. mai 2013 lækkaði Eik lægstu sethúsarentuna niður í 4%, og við virknaði frá 1. august 2013 hevur Eik aftur lækkað lægstu sethúsarentuna, hesa ferð niður í 3,75%. Umframt hetta er bidragið á realkredittlánum lækkað niður í 1,7%, og fleiri av tænastum bankans eru ókeypis.

Bygnaður og útreiðslustøði bankans eru eisini tillagað virksemið, og verður stórur dentur lagdur á at veita øllum kundum eina góða og skjóta tænastu til kappingarførar prísir.

Eik Banki arbeiðir miðvíst við at vinna ein størri part av føroyska marknaðinum.

**Nærri upplýsingar:** Súni Schwartz Jacobsen, forstjóri, tlf. 348 580, teldupostur: ssj@eik.fo